FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 2. november 2020
J. nr.: 20/00501
Viðgjørt: BAB

Svar upp á fyrispurning nr. 36/2020 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um MVG endurrindan og støðuna hjá smærri vinnurekandi

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Veit landsstýrismaðurin, um smáar fyritøkur, ið søktu um at útseta MVG, fáa trupulleikar við at rinda til freistina 15. november 2020?
2. Er ætlanin at gera eina serskipan fyri endurrindan fyri tær smærru fyritøkurnar, ið ikki kunnu rinda MVG í november, so tað ikki fær lemjandi avleiðingar fyri hesar fyritøkurnar?
3. Hevur landsstýrismaðurin nakra vitan um, hvussu støðan er hjá teimum smærri vinnurekandi sum heild?
4. Er ætlanin at seta í verk fleiri hjálparátøk fyri smærri fyritøkur, ið uppliva langtíðarfylgjur av støðuni við COVID-19?

Svar:
Vinnuhúsið hevur gjørt vart við, at nakrar fyritøkur hava vent sær til teirra um nevnda trupulleika. Tað merkir, at tær møguliga kunnu fáa avbjóðingar við gjaldførinum í november.

Taks hevur greitt frá, at tey meta at ein stórur partur av MVG'inum fyri 1. ársfjóðring, sum er útsettur til 16. november, longu er avroknað.

Taks sigur, at gjørdar vera avtalur regluliga um afturgjalding. Tí hava míni boð verið til Vinnuhúsið, at tey virkir sum ikki megna at rinda, kunnu venda sær til Taks um at fáa eina afturgjaldsavtalu.

Tinganes, 02. november 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum